


# Teir síðstu dagarnir

## – frásøga um týningina av ungarnsku jødunum

Hetta er ein amerikanskur dokumentarfilmur um týningina av teimum ungarnsku jødunum í síðsta árinum av 2. Veraldarbardaga, ið er grundaður á frágreiðingar frá sjónarváttar.

Tað vóru tey heilt fáu, ið ivaðust í, hvør fór at gerast tann stóri taparin, í 1944, tá 2. Veraldarbardagi leið ímóti endanum. Men hóast fleiri og stórar ósigrar á bardagavøllunum helt Týska Ríkið á fram við at brúka nógva orku uppá at týna evropeisku jødarnar. Og av øllum krígsárunum er júst 1944 árið, tá teir flestu jødarnir vórðu dripnir.

Noyddir á deyðsgongu
Teir ungarnsku jødarnir gingu ímóti tí somu lagnuni sum teirra flestu trúarfelagar í restini av evropa-meginlandinum. Men fyri ungarnsku jødarnar gekk tað sera skjótt og brádliga. Yvir nakrar fáar vetrarmánaðir í 1944 vórðu tíggjutúsindir noyddir at ganga fleiri hundrað kilometrar burtur frá teimum áloypandi sameindu herdeildunum, og ímóti týningarlegunum í Póllandi og Týsklandi. Hesar gongur vóru so ómenniskjaligar og krevjandi, at tær seinni eru kendar sum deyðsgongurnar. Og fleiri afturat hesum vórðu koyrd beinleiðis til týningarlegurnar í góðsvognum. Nakrir hundrað av teimum vórðu tó bjargaðir av tí djarva svenska diplomatinum Raul Wallenberg.

Tey yvirlivandi
Í dokumentarfilminum siga fimm yvirlivandi ungarnskir jødar frá einum gerandisdegi við hungursneyð, mannminkan og dagliga stríðinum fyri at yvirliva í nasisistisku týningarlegunum. Eisini verður sagt frá, hvussu nøkur megnaðu at varðveita treystið og við tí geva øðrum viljan til at yvirliva, men eisini um ta nær um óberiligu skuldarkensluna av at vera millum tey yvirlivandi. Frásagnirnar hjá teimum fimm sjónarváttunum verða lagdar inn millum søguligar upptøkur. Ein serlig frásøga um óvanliga lívið hjá nøkrum púra vanligum menniskjum.





**Fakta**

**Upprunaheiti: The Last Days**

Framleiðsla: James Moll fyri Steven Spielberg og The Shoah Foundation, 1999

Í filminum eru viðtalur við: Tom Lantos, kongressumboð; Alice Lok Cahana, listakvinna; ommuna Irene Zisblatt; handilsmannin Bill Basch og lærarinnuna Renee Firestone.

**Á Dr2 Mánadag 26. kl. 19.00**